NØVN Í VIKUNI

## Símun Waag Høgnesen 75



Mikudagin gjørdist Símun Waag Høgnesen í Klaksvík 75 ár. Símun er helst best kendur sum koyrilærari, og hann hevur lært eitt ótal av norðoyingum at koyra bil.

Símun byrjaði í fimtiárunum at undirvísa fólki í at koyra bil, og í 1965 gjørdist hann eksamineraður koyrilærari. Fram til 1996 arbeiddi hann sum koyrilærari øll árini uttan tvey, tá hann var vikarur.

Beint eftir kríggið fór Símun at læra til radiotelegraf, og hann sigldi eisini í nøkur ár, men tað varð á landi, at hann fór at hava sítt yrki, og umframt uppgávuna sum koyrilærari fór Símun eisini undir vøruflutning og taxakoyring. Hetta virksemið gjørdist seinni til bilstøðin Auto, sum virkaði í nógv ár.

Símun koyrdi í nógv ár skúlabørn á Norðoyri til og frá skúlanum í Klaksvík, og hann tók sær eisini eitt skifti av postinum, sum skuldi til Kalsoynna.

Símun hevur eisini altíð havt stóran áhuga fyri ítrótti, og serliga er tað tennis og fótbóltur, sum hann hevur brent fyri. Hann hevur – sum tað eisini sæst á myndini – spælt nógv tennis, og hann var føroyameistari í fótbólti við KÍ í 1945.

Símun hevur eisini starvast fyri Sosialin í nógv ár, og hann ger tað framvegis. Símun tekur sær av at koyra Sosialin í leysasølurnar í Klaksvík, og hetta starv hevur hann røkt til fulnar øll árini.

Símun og kona hansara, Lina, eiga fimm dreingir, fleiri abba- og ommubørn og eisini langabba- og langommubørn.

# Amtmansborgin umvæld fyri 3,5 mill.

**Einasta veruliga borgin í Føroyum, Amtmansborgin, verður fyri tíðina umvæld. Húsið var í so mikið ringum standi, at umfatandi umvælingararbeiði var alneyðugt, sigur Vibeke Larsen, ríkisumboð**

UMVÆLING
*Heri á Rógvi*



Stásiliga Amtmansborgin verður hesar dagarnar umvæld. Borgin hevur, síðani hon var bygd, hýst dana umboði í Føroyum. Amtmansborgin er eisini eitt rættiliga gamalt hús. Byggingin byrjaði í 1880 og tvey ár seinni stóð húsið liðugt bygt. Hesi seinastu 120 árini hevur heldur ikki verið talan um annað enn vanligt viðlíkahald, sum er gjørt við húsi. Húsið er gjørt úr basalti, og tað verður eisini hesin uppruna formur og útsjónd, sum tað verður vent aftur til nú.

Í sekstiárunum varð bygt uppí húsini, tá skrivstova skuldi gerast. Hesum partur av húsinum er úr øðrum tilfari enn eldri parturin. Vibeke Larsen sigur seg rokna við, at tað var í hesum sambandi, húsini vórðu málaði hvít. Nú tá ið so umfatandi arbeiði verður gjørt, fer tað at síggjast, at tilfari er ymiskt, men hetta heldur Vibeke ikki vera óheppi.

### Bæði innan og uttan

Tey flestu, sum hava gingið framvið húsunum hava óivað lagt til merkis, at húsini verða sandblást, og tann kendi hvíti liturin hevur lyndi til at hvørva. Hetta er tó bert ein partur av umvælingini. Umvælingararbeiðið umfatar bæði at bøtt verður um bygning innan og uttan og eisini verða krøvini hjá Brunaumsjónini eftirlíkað.

At húsini eru málaði hevur ført við sær, at húsini fukta nakað illa, og hetta merkist sera væl í fleiri pørtum av húsinum. Tað er í hesum sambandi, at húsini verða sandblást. Eisini verður eitt nýtt skifer tak lagt á. Eisini verður eitt tak lagt innundir skiferpláturnar. Húsini eru heldur ikki nakað serliga væl isoleraði, so talan kann skjótt gerast um eitt heilt nýtt klima.

Hóast flestu broytingarnar eru uttan á húsinum, so verður eisini gjørt ymiskt inni, sum einamest hevur við at branntryggja húsini at gera.

Tað er talan um eitt rættiliga stórt arbeiði, sum verður gjørt, og hetta kostar heldur ikki lítið. Játtanin, sum Ríkisumboðið hevur fingið til arbeiðið er 3,5 mill.

### Ikki sum at siga tað

3,5 mill eru rættiliga nógvir pengar, men hetta er nú einaferð tað, sum tað kostar at gera slíkar umvælingar. Vibeke Larsen sigur, at hetta er umbælingararbeiði fyri nógv ár, ið verður gjørt nú. Talan hevur einans verið um tað vanliga viðlíkahaldið, sum hevur verið gjørt tey nógvu seinastu árini, og hetta merkist eisini. Sambært Vibeke, so eru húsini í rættiliga ringum standi, og umvælingararbeiði var eisini tiltrongt. Vibeke ivast ikki í, at fleiri hol høvdu verið at sæð í takinum innan stutta tíð, um ikki farið var ígongd nú.

Tað, at biðja um 3,5 mill. til umvælingar, er heldur ikki bara sum at siga tað.

– Tað var neyðugt við nógvum frágreiðingum, áðrenn játtanin endiliga varð latin, sigur Vibeke Larsen. Hon sigur, at tað hevur verið eitt sindur torført at fáa donsku myndugleikarnar at skilja, at so mikið nógv av peningi var neyðugur. Serliga tá eitt nýtt hús hevði kostað minni. Tað hevði tó verið trupult at fingið eina nýggja Amtmansborg fyri 3,5 milliónir.

Av teimum 3,5 milliónunum fara 25% beint í landskassan.

### Nýggja ríkisumboðið nýtt hús

Tann 1. november skal tað av røttum av vera vaktarskifti á Amtmansborgini. Tá skal Birgit Kleis eftir ætlan byrja í nýggja starvinum sum ríkisumboð. Tað vera eisini eini stásilig hús bíða henni, tá hon verður umboð hjá donsku myndugleikunum í Føroyum. Um tað var fyri, at nýggja ríkisumboðið skuldi fáa betri karmar at virka undir, at umvælingararbeiðið varð gjørt er ikki gott at vita, men eftir hvat vit skilja á lagnum, so eru umvælingarnar illa tiltrongdar.

Birgit Kleis skal byrja í nýggja starvinum 1. november. Eftir ætlan skal hon gera eini tvey rend til Føroya áðrenn. Hetta verður m.a. gjørt fyri, at hon skal kunna hitta løgmann.

Birgit flytur til Føroya við manni og tveimum børnum.

# Tað byrjar at líkjast

**Arbeiðið við at gera nýtt løgtingshús gongur framá**

BYGGING
*Heri á Rógvi*



At kalla allar miðbýurin í Havn er at meta sum eitt byggipláss. Í øllum endum og kantum av miðbýnum hava handverkarar nógv at gera. Hetta arbeiðið setur eisini sín dám á býin.

Tryggingin hevur í longri tíð nú verið í holt við at gera nýggjar skrivstovar til teirra starvsfólk, og hetta byggiarbeiðið hevur at kalla broytt býarmyndina, og m.a. teir eyðkendu biltúrarnir hava verið noyddir at leggja eftir einari øðrvísi rutu.

Hitt stóra byggiarbeiðið í Havn er arbeiðið við at gera nýtt løgtingshús. Talan er um umfatandi arbeiði, har bæði løgtingið og umsitingin hjá løgtinginum skulu fáa betri umstøður. Eftir ætlan skal umstingin vera í bygninginum hjá Føroya Tele, og løtingshúsið skal eftir ætlan ikki brúkast til annað enn løgtingsfundirnar. Nógv varð tosað um, hvussu rættast var at gera við ovasta vald í Føroyum. Fyribils úrslitið av øllum tí nógva kjakinum kunnu havnafólk síggja í dag.

Sambært Súsonnu Danielsen, stjóra á løgtingsskrivstovuni, so er byggingin eitt sindur seinkað. Tað byggistigið, sum eftir ætlan skuldi verið liðugt á ólavsøku, er ikki liðugt, men hetta gevur tó ikki orsøk til at óttast, heldur Súsanna fyri.

– Arbeiðið er ígongd, og teir flestu trupulleikararnir eru loystir, sigur Súsanna Danielsen.

Tað eyðkendi tornið hevur fingið av at vita, og fólk flest bíða spent eftir, hvussu løgtingið í framtíðini fer at síggja út.



# Eidesgaard frøist um tilboðið

**– Vit vilja halda fullveldiskonseptið burtur frá einum framtíðar oljugrunni. Og er Karsten Hansen sinnaður fyri hesum, so eru møguleikarnir fyri einari semju við Javnaðarflokkin góðir. Hetta sigur formaður Javnaðarfloksins um tilboðið hjá fíggjarmálaráðharranum um at taka skiftisgrunnin úr uppskotinum um Búskapargrunn Føroya**



BÚSKAPARGRUNNUR
*Rúnar Reistrup*

– Tað frøir meg.

Soleiðis tekur formaður Javnaðarfloksins ímóti tilboðnum, sum Karsten Hansen gav um at slaka og taka skiftisgrunnin burturúr fyribilsuppskotinum um Búskapargrunn Føroya, um tað kann skapa grundarlag fyri einari semju um grunnin millum samgonguna og Javnaðarflokkin.

– Eg taki hattin av fyri, at Karsten Hansen hevur latið upp fyri einum møguleika til, at vit kunnu vera við í einari semju um búskapargrunnin. Eg haldi tað vera rætt av samgonguni at miðja eftir einari breiðari semju um Búskapargrunn Føroya, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum.

### Vil ikki síggja skiftisgrunn

Javnaðarflokkurin hevur fyrr gjørt greitt, at flokkurin ikki ætlar at vera við til at samtykkja eitt uppskot um skiftisgrunn.

Hósdagin í farnu viku løgdu fíggjarmálaráðharrin og landstýrismaðurin við sjálvstýrismálum fram eitt fyribilsuppskot til leingi ætlaða Búskapargrunn Føroya. Í uppskotinum varð millum annað ásett, at øll ríkisveitingin skuldi koyrast beinleiðis í grunnin, sum so skuldi flyta skiftisgjøld yvir á løgtingsfíggjarlógina. Soleiðis var Búskapargrunnur Føroya ein samanseting av skiftisgrunni og oljugrunni og skuldi tæna tveimum nokkso ymiskum endamálum, nevniliga at fíggja eina loysing frá Danmark, og at forða fyri at møguligar komandi oljuinntøkur fara beint í landskassan.

### Karsten lat hurðina upp

Men í Sosialinum týsdagin lat Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, hurðina upp fyri einari breiðari semju í tinginum fyri búskapargrunninum, tá hann bjóðaði sær til at lúka øll orð um skiftisgjøld og ríkisveiting úr uppskotinum.

Karsten Hansen segði tá, at tað lá eingin trupulleiki í at gera ein skiftisgrunn og ein oljugrunn hvør sær heldur enn ein samansettan grunn, um hetta kundi tryggja eina breiða semju í tinginum fyri Búskapargrunni Føroya.

– Tað er parturin um skiftisgrunnin, sum ger at vit í Javnaðarflokkinum ikki kunnu taka undir við uppskotinum um Búskapargrunn Føroya. So um Karsten Hansen er til reiðar at taka tann partin úr uppskotinum, eru møguleikarnir fyri einari fornuftigari semju við Javnaðarflokkin góðir, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Samgongan ósamd innanhýsis

Men eitt er, at Javnaðarflokkurin nú kann taka undir við ætlanini um Búskapargrunn Føroya. Hitt er, at teir báðir stóru samgonguflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin, í løtuni ikki eru samdir innanhýsis um hvussu uppskotið skal síggja út.

Løgmaður hevur sagt, at hann vil ikki vera við til at bera eitt uppskot um búskapargrunn í tingið, sum ikki ásetur nærri reglur fyri útgjaldið úr grunninum.

Fíggjarmálaráðharrin og landsstýrismaðurin við sjálvstýrismálum siga hinvegin, at ásetingar um útgjaldið kunnu bíða, men at sjálvur grunnurin hevur alstóran skund. Í framlagda fyribilsuppskotinum um Búskapargrunn Føroya, eru ongar ásetingar um útgjaldið úr grunninum.

Her hellir formaðurin í Javnaðarflokkinum mest ímóti sjónarmiðunum hjá Tjóðveldisflokkinum.

– Tað er kanska ikki so øgiliga neyðugt at vit hava eina útgjaldsskipan greiða longu nú, men eg haldi, at vit skulu gera eina avtalu um, nær vit vilja hava eina útgjaldsskipan klára og seta eitt tíðspunkt fyri hesum í lógina, sigur Jóannes Eidesgaard, ið sigur seg nú bíða eftir fundarboðum frá fíggjarmálaráðharranum.

Formaður Sambandsfloksins:

# Fer ikki at samstarva um búskapargrunn

**Formaður Sambandsfloksins hevur ikki álit á sitandi samgongu og er tí ikki sinnaður at vera við í nakrari breiðari semju um Búskapargrunn Føroya. – Vit vita hvat endamálið hjá sitandi samgongu er, vit halda lítið um tað, og tí fara vit ikki at samstarva við samgonguni, sigur Lisbeth L. Petersen**



BÚSKAPARGRUNNUR
*Rúnar Reistrup*

Í Sosialinum týsdagin lovaði fíggjarmálaráðharrin at taka hvørt orð um ríksiveiting og skiftisgjøld burturúr uppskotinum um Búskapargrunn Føroya, um hetta kundi skapa grundarlag fyri einari breiðari semju í løgtinginum.

Hetta tykist at hóva formanninum í Javnaðarflokkinum, sum í blaðnum í dag sigur seg bíða eftir fundarboðum frá fíggjarmálaráðharranum. Men lyftini um at skilja skiftisgrunnin burturúr Búskapargrunni Føroya broyta ikki støðuna hjá Sambandsflokkinum, og flokkurin ætlar sær framhaldandi ikki at vera við til at gera eina breiða semju um búskapargrunnin.

– Tjóðveldisflokkurin hevur alt valskeiðið staðið nógv nærri at Javnaðarflokkinum enn at okkum. Tað hevur nokk allatíðina verið ætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum at fáa Javnaðarflokkin at taka undir við fullveldisætlanini, og tí er skiljandi at teir nú royna at lokka við at umdoypa grunnin. Men vit vita væl at endamálið við grunninum framhaldandi er at fíggja fullveldið, og tað vilja vit sjálvsagt ikki vera við til, sigur Lisbeth L. Petersen, formaður í Sambandsflokkinum.

### Einki álit á samgonguni

Formaður Sambandsfloksins sigur seg einki álit hava á sitandi samgongu, og tí er hon ikki sinnað at samstarva við samgonguflokkunum um ein grunn til oljuinntøkur, hóast hon ikki heldur ein slíkan vera nakra vánaliga loysn.

– Ein oljugrunnur er sum fyribrigdi ein góð loysn fyri føroyska búskapin um oljupengar fara at streyma inn í landið. Men sum er veit ongin, um tað yvirhøvur koma nakrar veruligar oljuinntøkur, og tað stendur øllum greitt, at tað gongur lang tíð frá at olja møguliga verður funnin, til rættilig framleiðsla fer í gongd. Tí hevur tað ongan skund í løtuni at seta ein oljugrunn á stovn, sigur Lisbeth L. Petersen, sum er sinnað at fara í kjak við allar flokkar um ein oljugrunn, men ikki at samtykkja nakað uppskot enn.

– Eg haldi ikki, at sitandi samgonga skal seta grunnin á stovn. Tað kann bíða, sigur Lisbeth L. Petersen formaður Sambandsfloksins í viðmerking til lyftini hjá Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharra, um at broyta uppskotið um Búskapargrunn Føroya til tess at fáa eina breiða semju í lag í tinginum fyri uppskotinum.